*Løgtingsins umboðsmaður*

*Ársfrágreiðingin 2012*

LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# *Ársfrágreiðingin 2012*

Tórshavn, 2013

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2012
© 2013 Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent

ISBN 978-99918-854-1-4

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# *Innihaldsyvirlit*


I. Um embætið . . . . . . . . . . 9

II. Gongdin í 2012 . . . . . . . . . . 11

III. Hagtøl . . . . . . . . . . 14

IV. Samandráttir – álit . . . . . . . . . . 26

V. Talufrælsi, tagnarskylda og loyalitetur . . . . . . . . . . 33

VI. Eftirlit . . . . . . . . . . 40

VII. Skjøl . . . . . . . . . . *46*

1. Umboðsmanslógin . . . . . . . . . . 46

2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann . . . . . 50

# *Til Løgtingið*

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2012 Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2013.

Frágreiðingin er býtt upp soleiðis:

I. Um embætið
II. Gongdin í 2012
III. Hagtøl
IV. Samandráttir – álit
V. Grein: Talufrælsi, tagnarskylda og loyalitetur
VI. Grein: Eftirlit
VII. Skjøl
   1. Umboðsmanslógin
   2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann

Tórshavn, juni 2013

*Sólja í Ólavsstovu*

# *I. Um embætið*

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5-ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins. Tann 8. oktober 2010 endurvaldi Løgtingið meg sum Løgtingsins Umboðsmann fyri tíðarskeiðið 1. janaur 2011 til 31. desember 2016. Eg tók við embætinum á fyrsta sinni tann 1. janaur 2006. Umframt meg sjálva hevur embætið verið mannað við løgfrøðiligu medarbeiðarunum mínum, Jóhannu Arge, ráðgeva, Birtu Biskopstø, ráðgeva og Jette Eirkistoft, skrivstovuleiðara.

Í sambandi við at Jóhanna Arge, ráðgevi hevur verið í farloyvi í 2012, varð Majbritt Lamhauge sett í starv sum fulltrúi í farloyvistíðini.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.( § 4, stk. 5 ).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5). Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir,

sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4). Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5). Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. ( § 8 ).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann, at álvarsligt mistak ella vatnsketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10). Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá. ( § 12 ).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Adressan er: undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008, FO-110 Tórshavn, og
teldupostadressan er: lum@lum.fo
Heimasíða umboðsmansins er: www.lum.fo

# *II. Gongdin í 2012*

Í 2012 komu inn 50 klagur. Av teimum klagunum, sum komu inn í 2012, vóru 46 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2012. Harumframt vóru 16 klagur avgreiddar, sum vóru innkomnar (men ikki avgreiddar) frá undanfarnu árum.

Talið av klagum er á hædd við talið undanfarin ár. Av klagunum, sum eru móttiknar í 2012, vórðu 41 avvístar svarandi til 82 %. Hetta tal er væl hægri enn undanfarin ár. Hóast nógvar klagur verða avvístar, merkir hetta ikki, at umboðsmaðurin ikki hevur kannað hesi mál. Í nøkrum av teimum avvístu málunum hevur myndugleikin boðað frá, at kanningin hjá umboðsmanninum hevur viðført, at málið verður tikið upp til nýggja viðgerð. Í øðrum málum vísir kanningin, at umboðsmaðurin ikki metir seg kunna hjálpa klagaranum.

Nakað, sum hevur eyðkent virksemið í 2012, er, at tað hava verið gjørdar eftirlitskanningar av sambýlum við menningartarnaðum og sinnisveikum búfólkum. Endaliga arbeiðið við hesum kanningum var ikki liðugt í 2012. Hesar kanningar hava víst, at stórur tørvur er á at gera slíkar kanningar. Ætlanin er í framtíðini at umskipa arbeiðsorkuna hjá umboðsmanninum soleiðis, at meira orka verður løgd í eftirlitsvitjanir á stovnum og sambýlum innan Almannaverkið.

Í døgunum 22. mai til 25. mai 2012 var føroyski umboðsmaðurin á fyrsta sinni vertur fyri einum norðurlendskum umboðsmannafundi í Føroyum. Fundurin varð hildin á Hotel Tórshavn. Á fundinum vórðu umrøddir spurningar av felags áhuga. Millum evnini, sum vórðu umrødd, var m.a.: Hvussu brúka myndugleikar sosialar miðlar sum Facebook og Twitter, immuniteturin hjá umboðsmansstovnunum og eftirlitið hjá umboðsmanninum við almennum eftirlitsmyndugleikum.



*Norðurlendsku umboðsmenninir og embætisfólk á fundi í Tórshavn, mai 2012*

Í 2012 vórðu Føroyar góðkendar sum sjálvstøðugur limur í International Ombudsman Institute – IOI. Hesin felagsskapur varð stovnaður í 1978 og eru meira enn 150 umboðsmansstovnar runt allan heimin limur í hesum felagskapi

Í døgunum frá 12. til 16. november 2012 luttók umboðsmaðurin í altjóða ráðstevnu hjá IOI, sum varð hildin í Wellington, New Zealandi. Tað var 10. ferð, henda ráðstevna varð hildin, og fyrstu ferð at Føroyar luttók undir egnum flaggi.

Í sambandi við ráðstevnuna varð skipað fyri stórum 50-ára hátíðarhaldi fyri, at New Zealendski umboðsmansstovnurin var settur á stovn. 50-ára dagurin setti sín dám á innihaldið á ráðstevnuni, sum viðgjørdi endamálið við virkseminum hjá umboðsmanninum, og vóru mannarættindi eitt gjøgnumgangandi aðalevni á ráðstevnuni. Á ráðstevnuni luttóku 80 ymisk lond, og hóast limalondini sosialt og politisk eru ógvuliga ymisk, eru tey grundleggjandi viðurskiftini og rættindini hjá vanligum borgarum eins í arbeiðinum hjá umboðsmonnunum kring allan heim.




*Frá fundinum í Wellington, New Zealandi, november 2012*

Umboðsmenninir í Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í 2012 var bert ein fundur, og varð hann hildin í Keypmannahavn í februar mánaði í sambandi við, at danski umboðsmaðurin Hans Gammeltoft Hansen legði frá sær aftaná 25 ár sum umboðsmaður.

# *III. Hagtøl*

**Klagur innkomnar í 2012 býttar á myndugleikar**

Í 2012 komu inn 50 klagur

Hesar klagurnar vóru býttar soleiðis millum ymsu myndugleikarnar:

(Talva 1)

| ***Myndugleiki:*** | **Klagur:** |
|---|---|
| Fíggjarmálaráðið | 3 |
| Fiskimálaráðið | 2 |
| Mentamálaráðið | 7 |
| Vinnumálaráðið | 1 |
| Heilsumálaráðið | 1 |
| TAKS | 1 |
| Almannaverkið | 11 |
| Landssjúkrahúsið | 1 |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 3 |
| Umhvørvisstovan | 2 |
| Landsverk | 1 |
| Strandfaraskip Landsins | 1 |
| Akstovan | 1 |
| Vinnuháskúlin | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 1 |
| Búnaðargrunnurin | 1 |
| Vinnusjúkragrunnurin | 1 |
| Kommunur | 6 |
| Løgtingið | 1 |
| Føroya Landfúti | 2 |
| Atlantic Airways | 1 |
| Posta | 1 |
| **Tilsamans** | **50** |

## Klagur innkomnar í 2012 býttar á myndugleikar (talva 1)



## Innkomnar klagur í 2012 býttar á málsøki og klaguinnihald

(Talva 2)

| *Málsøki:* | *Tal av klagum* | *Klagur um avgerðir* | *Klagur um málsviðgerð* | *Klagur um atburð o.a.* |
|---|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 7 | 5 | 2 | 0 |
| Eftirlønarmál | 3 | 3 | 0 | 0 |
| Almannamál | 10 | 3 | 6 | 1 |
| Skattur v.m. | 2 | 1 | 1 | 0 |
| Tolling | 1 | 0 | 0 | 1 |
| Undirvísing, gransking v.m. | 1 | 0 | 0 | 1 |
| Skúlamál | 1 | 0 | 1 | 0 |
| Fiskivinnumál | 2 | 2 | 0 | 0 |
| Byggimál, umhvørvi v.m. | 5 | 3 | 2 | 0 |
| Innlit | 12 | 5 | 6 | 1 |
| Barnavernd | 1 | 0 | 1 | 0 |
| Ymiskt | 5 | 2 | 3 | 0 |
| **Tilsamans** | **50** | **24** | **22** | **4** |

### Klagur innkomnar í 2012 býttar á málsøki (talva 2)



**Klagur innkomnar í 2012 býttar eftir klaguinnihaldi (talva 2)**




## Klagur endaliga avgreiddar í 2012

Av teimum 50 klagunum, sum komu inn í 2012 vóru 46 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2012. Harumframt vóru avgreiddar 16 klagur frá undanfarnu árum. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

(Talva 3)

| *Myndugleiki:* | *Klagur* | *Avvístar* | *Viðgjørdar* | *Viðgjørdar uttan átalu/ tilmæli* |
|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 1 | 1 | | |
| Uttanríkisráðið | 1 | | 1 | |
| Fíggjarmálaráðið | 2 | 2 | | |
| Fiskimálaráðið | 2 | 2 | | |
| Mentamálaráðið | 10 | 7 | 3 | |
| Vinnumálaráðið | 1 | 1 | | |
| Heilsumálaráðið | 1 | 1 | | |
| TAKS | 1 | 1 | | |
| Almannaverkið | 13 | 10 | 3 | |
| Landssjúkrahúsið | 1 | 1 | | |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 3 | 2 | 1 | |
| Umhvørvisstovan | 2 | 2 | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Landsverk | 1 | 1 | |
| Strandfaraskip Landsins | 1 | 1 | |
| Akstovan | 1 | 1 | |
| Vinnuháskúlin | 2 | 1 | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 3 | 2 | 1 |
| Búnaðargrunnurin | 1 | 1 | |
| Vinnusjúkragrunnurin | 1 | 1 | |
| Kommunur | 9 | 6 | 3 |
| Løgtingið | 1 | 1 | |
| Føroya Landfúti | 2 | 2 | |
| Atlantic Airways | 1 | 1 | |
| Posta | 1 | 1 | |
| **Tilsamans** | **62** | **49** | **13** |

**Klagur endaliga avgreiddar í 2012 (talva 3)**



**Klagur avvístar í 2012**

Í 2012 vóru 49 klagur avvístar av ymiskum orsøkum, harav 8 klagur frá undanfarnu árum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

(Talva 4)

| *Avvísingarorsøk:* | *Klagur* |
|---|---|
| Innkomin ov seint | 3 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur | 7 |
| Ikki grundarlag fyri víðari kanningum | 32 |
| Uttanfyri heimildarøki | 6 |
| Afturkallað | 1 |
| **Tilsamans** | **49** |

**Klagur avvístar í 2012 býttar eftir avvísingarorsøk (talva 4)**



**Viðgjørdar klagur í 2012 býttar á málsøki**
Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2012, kunnu býtast upp eftir málsøki á henda hátt.

(Talva 5)

| *Málsøki* | *Klagur* |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 11 |
| Eftirlønarmál | 2 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 2 |
| Almannamál | 11 |
| Skattur v.m. | 2 |
| Tolling | 1 |
| Undirvísing, gransking v.m. | 2 |
| Skúlamál | 1 |
| Fiskivinnumál | 2 |
| Byggimál, umhvørvi v.m. | 6 |
| Innlit | 13 |
| Barnavernd | 1 |
| Kommunumál | 1 |
| Ymiskt | 7 |
| **Tilsamans** | **62** |

**Klagur viðgjørdar í 2012 býttar á málsøki (talva 5)**



**Innkomnar klagur 2001-2012**




**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum**
Í teimum 13 endaliga viðgjørdu klagunum í 2012 hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 6)

| ***Viðgerðartíð í miðal:*** | |
|---|---|
| Aftan á partshoyring | 4 mðr. 27 dagar |
| Samlað | 12 mðr. 6 dagar |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum**
Í teimum 49 avvístu klagunum hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 7)

| ***Viðgerðartíð í miðal:*** | |
|---|---|
| Aftan á partshoyring | 1 mðr. 2 dagar |
| Samlað | 2 mðr. 18 dagar |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum**

Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur, hevur málsviðgerðartíðin í miðal verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 8)

| | Viðgerðartíð aftaná partshoyring | Viðgerðartíð tilsamans |
|---|---|---|
| viðgerðartíð í miðal: | 1 mðr. 24 dagar | 4 mðr. 27 dagar |

# Sammetingar 2010, 2011 og 2012

**Innkomnar klagur m.v.**




**Avvísingarorsøk**



**Innkomnar og viðgjørdar klagur býttar á málsøki**




**Klagur um avgerðir, málsviðgerð og atburð**




Innkomnar klagur býttar á áðalráðini,
stovnar undir teimum og kommunur
2010
2011
2012
20
16
12
8
4
0
Løgmansskrivstovan
Uttanríkisráðið
Innlendismálaráðið
Fiskimálaráðið
Vinnumálaráðið
Mentamálaráðið
Almannamálaráðið
Fíggjarmálaráðið
Heilsumálaráðið
Kommunur

# *IV. Samandráttir – álit*

**Álit viðvíkjandi klagu um vantandi innlit í fundarfrágreiðingar frá fullveldissamráðingunum**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerðina hjá Løgmansskrivstovuni at nokta klagaranum innlit í fundarfrágreiðingarnar frá fundunum millum føroyska landsstýrið og donsku stjórnina um føroyskt fullveldi árini 1999 og 2000.

Løgmansskrivstovan grundaði m.a. avgerðina á, at talan var um einsíðugar frágreiðingar, ið lýstu føroysku fatanina av samráðingarfundunum, og at ongar upplýsingar um veruligar umstøður av týdningi fyri málið vóru í frágreiðingunum. Løgmansskrivstovan metti tí, at talan var um innanhýsis arbeiðsskjøl, sum vóru gjørd til egna nýtslu hjá avvarðandi landsstýrisfólkum og tí ikki fevnd av rættinum til innlit sambært innlitslógini.

Umboðsmaðurin var samdur við Løgmansskrivstovuni í, at frágreiðingarnar vóru av tílíkum slag, at tær ikki vóru fevndar av rættinum til innlit, men viðmerkti tó, at tað ikki var viðkomandi at vísa til § 10, nr. 1 í innlitslógini fyri at nokta innlit í frágreiðingarnar. (j. nr. 201000094)

**Álit viðvíkjandi klagu um skrivliga ávaring til ein lærara á Vinnuháskúlanum**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um grundarlagið fyri og handfaringina av einari skrivligari ávaring, sum ein lærari fekk frá Vinnuháskúlanum. Skrivliga ávaringin var givin fyri brot á loyalitetsskylduna og vantandi samstarvsvilja. Ávaringin varð kærd til Vinnumálaráðið, sum staðfesti avgerðina.

Umboðsmaðurin hevði onga viðmerking til, at Vinnuháskúlin valdi at

geva klagaranum eina skrivliga ávaring fyri brot á loyalitetsskylduna. Umboðsmaðurin helt tað tó ikki vera nøktandi, at Vinnuháskúlin ikki neyvt grundgav fyri, hvat leiðslan meinti við vantandi samstarvsvilja.

Av tí at so long tíð var fráliðin, síðani ávaringin var givin, valdi umboðsmaðurin ikki at gera meira við henda spurningin. Umboðsmaðurin helt tað ikki vera nøktandi, at Vinnumálaráðið ikki hevði skrásett tey skjøl, sum klagarin handaði Vinnumálaráðnum á einum fundi. (j. nr. 200900115)

**Álit viðvíkjandi klagu um uppsagnir í Uttanríkisráðnum**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um uppsagnir av starvsfólkum í Uttanríkisráðnum vegna sparingar. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja, at Uttanríkisráðið í sambandi við sparingar og bygnaðarbroytingar hevði gjørt nakra meting av framtíðarvirkseminum og starvsfólkahópinum samanhildið við tær uppgávur, sum eitt skert Uttanríkisráð skuldi røkja.

Vísandi til ta manglandi fyrisitingarliga viðgerðina helt umboðsmaðurin, at talan var um grundleggjandi feilir í málsviðgerðini av uppsagnarmálunum og gav Uttanríkisráðnum eina álvarsliga átalu fyri hetta.

Umboðsmaðurin mælti løgmanni til at umhugsa at taka hetta málið uppaftur til nýggja viðgerð og lata seg frætta, hvat víðari hendir í málinum. Av tí, at umboðsmaðurin helt talan vera um álvarslig brek við viðgerðini hjá Uttanríkisráðnum, varð álitið samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini sent formansskapinum í Løgtinginum til kunningar.

Løgmansskrivstovan kunnaði 7. mai 2012 umboðsmannin um, at løgmaður tók niðurstøðurnar hjá umboðsmanninum til eftirtektar og staðfesti, at talan hevði verið um eina sera óhepna málsgongd, men at málið fór ikki at verða tikið uppaftur. (j. nr. 201100024)

**Álit viðvíkjandi klagu um burturvísing vegna ólógliga parkering**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerðina hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði at burturvísa einum næmingi fyri brot á skilhaldsreglur skúlans um parkering.

Umboðsmaðurin hevði onga viðmerking til, at Føroya Studentaskúli og HF-skeið hevur ásett skilhaldsreglur fyri skúlan, og at parkeringsviðurskiftini uttan fyri skúlan eru fevnd av hesum skilhaldsreglum. Umboðsmaðurin metti tó ikki, at lógarheimild var fyri at burturvísa einum næmingi fyri brot á skilhaldsreglur skúlans, og heitti tí á Mentamálaráðið um at broyta studentaskúlakunngerðina soleiðis, at ásetingin í § 14 um burturvísing verður strikað.

Umboðsmaðurin heitti samstundis á Mentamálaráðið um at seta seg í samband við løgregluna og fáa skipað ferðsluviðurskiftini, soleiðis at ongin vandi verður fyri brunatrygdini ella ferðsluni annars uttan fyri Føroya Studentaskúli og HF-skeið í Hoydølum.

Við skrivi, dagfest 7. mars 2012, boðaði Mentamálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið d.d. hevði sent Føroya Landfúta skriv um ferðsluviðurskiftini.

Við skrivi, dagfest 6. februar 2013, boðaði Mentamálaráðið umboðsmanninum frá, at neyðuga lógarheimildin var fingin til vega í § 28 í nýggju studentaskúlalógini (Ll. nr. 62 frá 15. mai 2012, sum kom í gildi 1. januar 2013), soleiðis at tað ikki longur var neyðugt at strika § 14 í studentaskúlakunngerðini. (j. nr. 201100034)

**Skriv um drúgva viðgerðartíð á Almannastovuni í sambandi við útvegan av stovnsplássi**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um manglandi stovnstilboð til eina unga gentu. Umboðsmaðurin metti, at tann samlaða viðgerðartíðin á Almannastovuni hevði verið alt ov drúgv. Umboðsmaðurin helt tað als ikki vera ein nøktandi arbeiðsgongd innanhýsis á Almannastovuni, at tað gekk so lang tíð, áðrenn frágreiðingar og

skriv, sum høvdu stóran týdning fyri málið, komu fram til rætta málsviðgera. Serliga tá talan er um børn og ung, er tað av stórum týdningi, at viðgerðartíðin verður so stutt sum gjørligt.

Umboðsmaðurin heitti tí á Almannastovuna um skjótast møguligt at gera nakrar greiðar mannagongdir fyri handfaring av slíkum málum, og at lata seg frætta, hvørji stig Almannastovan ætlar at taka fyri at stytta um málviðgerðartíðina í slíkum málum. Almannastovan hevur í skrivi tann 29. juni 2012 kunnað umboðsmannin um, hvat víðari er hent í málinum. (j. nr. 201000025)

**Skriv um handfaringina hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni av einari innlitsáheitan**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni av einari innlitsáheitan. Umboðsmaðurin helt tað vera alt annað enn nøktandi, at tað gingu 29 dagar frá tí, at innlitsumbønin varð sett fram, til hon var avgreidd, og gav Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eina átalu fyri handfaringina av málinum. (j. nr. 201200056)

**Álit viðvíkljandi klagu um prísáseting av trygdarskeiðum**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um prísáseting á trygdarskeiðum á Trygdarmiðstøðini og hevur í hesum sambandi viðgjørt spurningin um, hvønn lógstatus viðmerkingar til fíggjarlógina hava, og um hesar viðmerkingar kunnu metast at vera materiell heimild fyri prísáseting á trygdarskeiðum hjá einum almennum stovni.

Umboðsmaðurin metti, at viðmerkingar til fíggjarlógina ikki eru partur av lógartekstinum, og at tær tí ikki kunnu hava lóggávustatus ella verða materiell heimild fyri einari játtan. Vísandi til hesa manglandi materiellu heimild fyri prísáseting av virksemi hjá einum almennum stovni, heitti umboðsmaðurin á Mentamálaráðið um at taka tann materiella heimildarspurningin til viðgerðar og fáa til vega ta neyðugu materiellu heimildina fyri prísáseting á trygdarskeiðum hjá Trygdarmiðstøðini.

Við skrivi, dagfest 3. oktober 2012, boðaði Mentamálaráðið umboðsmanninum frá, at landsstýrismaðurin tók niðurstøðuna hjá umboðsmanninum til eftirtektar, og at stig fóru at verða tikin til at seta í gildi kunngerð, sum heimilaði gjaldi fyri skeið innan trygd á sjónum (kunngerð nr. 100 frá 12. oktober 2012 um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum). (j. nr. 201100023)

**Álit um eina klagu um handfaringina hjá Mentamálaráðnum av eini kæru um eina provtøku á Føroya Handilsskúla**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Mentamálaráðnum av eini kæru um eina próvtøku á Føroya Handilsskúla. Umboðsmaðurin metti ikki, at kærumálið hevði fingið eina nøktandi málsviðgerð og gav Mentamálaráðnum eina átalu fyri handfaringina av málinum. Av tí at so long tíð var fráliðin síðani umrøddu próvtøku, metti umboðsmaðurin, at tað ikki tænti nøkrum endamáli at viðgera tann partin, ið viðvíkti uppafturtøku av kærda málinum. Mentamálaráðið hevur í skrivi tann 15. februar 2013 kunnað umboðsmannin um, hvat víðari er hent í málinum. (j. nr. 201000041)

**Borgarar hava eisini krav um alment innlit í summarfrítíðini**

Umboðsmaðurin hevur heitt á Búnaðargrunnin um at broyta sína siðvenju at stongja skrivstovuna í 4 vikur í summarfrítíðini, soleiðis at tíðarásetingini í lógini um alment innlit kann verða hildin. (j. nr. 201200061)

**Klaga um handfaringina hjá Vágs kommunu av einari innlitsumbøn**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Vágs kommunu av einari innlitsumbøn. Umboðsmaðurin helt tað vera alt annað enn nøktandi, at tað gingu 18 dagar frá tí, at innlitsumbønin varð sett fram, til hon var avgreidd, og gav Vágs Kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum.( j. nr. 201200014.)

**Álit um vantandi útgjald av uppihaldsveiting frá Almannaverkinum (Almannastovuni)**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um vantandi útgjald av uppihaldsveiting frá Almannaverkinum. Umboðsmaðurin metti, at talan var um eina fyrisitingarliga avgerð, tá Almannaverkið steðgaði útgjaldinum og niðurlegði málið hjá klagaranum. Almannaverkið hevði tí skyldu til at fylgja ásetingunum í Fyrisitingarlógini um m.a. parthoyring, grundgeving og kæruvegleiðing.

Umboðsmaðurin gav Almannaverkinum eina átalu fyri málsviðgerðina og handfaringina í málinum og bað Almannaverkið um at broyta sína mannagongd, tá mál verða niðurløgd. Eisini var Almannaverkið biðið um at taka málið hjá klagaranum upp til viðgerðar.

Við skrivi, dagfest 18. januar 2013, boðaði Almannaverkið umboðsmanninum frá, at niðurstøða umboðsmansins er tikin til eftirtektar, at klagarin hevði fingið játtað uppihaldsveiting, og at mannagongdirnar eru broyttar. (j. nr. 201100083)

**Álit viðvíkjandi klagu um manglandi starvsaldur**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Tórshavnar kommunu av einum starvsfólkamáli. Umboðsmaðurin metti ikki, at tað var nøktandi, at Tórshavnar kommuna ikki hevði flokkað starvið, áðrenn hetta var lýst leyst. Umboðsmaðurin helt, at ein týðandi broyting av lønar- og setanartreytunum mátti metast at vera fyrisitingarlig avgerð, og hevði Tórshavnar kommuna tí skyldu til at fylgja ásetingunum í Fyrisitingarlógini um m.a. partshoyring, áðrenn lønarásetingin varð broytt.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum og heitti á kommununa um skjótast gjørligt at fáa setanarviðurskiftini í rætt lag, og um at lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum.

Við skrivi, dagfest 31. oktober 2012, boðaði Tórshavnar kommuna umboðsmanninum frá, at størvini sum ráðgevarar eru flokkað, og at lønarviðurskiftini hjá klagaranum eru avgreidd. (j. nr. 201100099)

**Álit viðvíkjandi klagu um handfaringina hjá Fjølmiðlanevndini av eini innlitsumbøn**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Fjølmiðlanevndini av eini umbøn um innlit.

Umboðsmaðurin helt, at innlitsumbønin, sum fevndi um bert eitt skjal, átti at verið avgreidd alt fyri eitt og gav Fjølmiðlanevndini eina átalu fyri handfaringina av málinum. (j. nr. 201200011)

**Skriv um handfaringina hjá Almannaverkinum av umsóknum um fyritíðarpensjón**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Almannaverkinum av eini umsókn um fyritíðarpensjón. Klagarin søkti fyri meira enn 5½ árum síðani um fyritíðarpensjón, og hóast 3 serlæknaváttanir hava staðfest, at arbeiðsførleikin hjá klagaranum er munandi skerdur, hevur Almannaverkið enn ikki gjørt ta neyðugu metingina av, hvat arbeiði klagarin megnar.

Umboðsmaðurin gav Almannaverkinum eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av hesum máli, og heitti samstundis á Almannaverkið um skjótast gjørligt at taka avgerð í málinum. Umboðsmaðurin bað Almannaverkið lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum.

Við skrivi, dagfest 4. mars 2013, boðaði Almannaverkið umboðsmanninum frá, at niðurstøða umboðsmansins er tikin til eftirtektar, og at gongd var í málinum. Umboðsmaðurin hevur boðað Almannaverkinum og klagaranum frá, at gjørt verður ikki meira við málið í løtuni. (j. nr. 201200095)

*Sólja í Ólavsstovu,*
*umboðsmaður*



# V. Talufrælsi, tagnarskylda og loyalitetur

> *„Sum ein liður í loyalitetsskylduni móti arbeiðsplássinum mugu starvsfólk metast at hava bæði rætt og skyldu til at boða leiðsluni frá viðurskiftum, sum ikki eru nøktandi. Hetta skal tó verða gjørt á ein sømiligan hátt, og uttan at nýta ein ov harðan ella grovan málburð, sum av røttum kann skaða viðurskiftini á arbeiðsplássinum" (Brot úr áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200700008)*

Hóast umboðsmaðurin bert hevur viðgjørt fáar klagur um brot á tagnar- og loyalitetsskylduna hjá alment settum starvsfólkum, verður hetta evnið stundum viðgjørt í almenna kjakinum. Tað eru serliga fjølmiðlafólk, sum finnast at alment settum starvsfólki, tí tey luttaka ov lítið í kjakinum um samfelagsviðurskifti gererelt ella um teirra arbeiðsøki serstakt, sjálv um tey sum serfrøðingar kunnu geva eitt gott og týdningarmikið íkast til samfelagskjakið.

Hví so er, er ikki lætt at siga. Onkur vil halda, at tey sum alment sett starvsfólk skulu vera loyal mótvegis arbeiðsgevaranum, og henda loyalitet vísa tey best við onki at siga alment. Onnur tora snøgt sagt ikki, tí tey eru bangin fyri teimum avleiðingum, sum tað kann hava fyri setanarviðurskiftini, um tey taka lut í almenna kjakinum.

Lógin um alment innlit og fyrisitingarlógin hava til endamáls at geva betri gjøgnumskygni og opinleika í almennu fyrisitingini. Tí er tað bæði í lagi og neyðugt, at almenn starvsfólk gera vart við viðurskifti, sum tey hava eina serligan vitan og kunnleika um.

**Talufrælsi fyritreyt fyri fólkaræði**

Talufrælsi er grundarlag undir og ein fyritreyt fyri einum vælvirkandi fólkaræði. Talufrælsi er grundfest í § 77 í grundlógini, har ásett verður, at, „ein og hvør hevur rætt til á prenti, skrift og talu at almannakunngera sína hugsan, tó undir ábyrgd mótvegis dómstólunum“. Hetta talufrælsi er galdandi fyri bæði faklig viðurskifti, persónlig sjónarmið, politiska støðutakan, og tá ítøkilig viðurskifti, praktiskar vegleiðingar o.a. skulu endurgevast.

Í grundlógini er ásett eitt forboð ímóti, at almennir myndugleikar seta í verk sensur ella aðrar fyriskipanir, sum skerja talufrælsið. Hetta merkir, at ein myndugleiki kann ikki avmarka starvsfólk í at bera fram síni sjónarmið alment ella krevja, at starvsfólk skulu hava eina góðkenning frá arbeiðsgevaranum, áðrenn viðkomandi sigur sína hugsan alment. Talufrælsi er somuleiðis grundfest í grein 10 í mannarættindarsáttmálanum.

Almenn starvsfólk hava sama talufrælsi sum allir aðrir borgarar, og tey kunnu taka lut í almennum orðaskifti og koma við sínum persónligu sjónarmiðum. Hetta er eisini galdandi fyri viðurskifti innan fyri egið arbeiðsøki.

Tað hevur serliga stóran týdning í einum lítlum samfelagi, at alment starvsfólk – ikki minst í miðfyrisitingini – geva sítt íkast til almenna orðaskiftið. Orðaskifti um samfelagsviðurskifti hava stóran týdning

fyri ta fólkaræðiligu samfelagstilgongdina, og tí er neyðugt at fáa mál lýst frá so nógvum sjónarhornum sum gjørligt.

Sambært donsku umboðsmans- og rættarsiðvenjuni á økinum hava almenn starvsfólk rætt til, eisini alment, at finnast at, um so er, at arbeiðsumstøður teirra ella tað virksemi, sum tey fáast við, má metast at vera óforsvarligt, t.d. orsakað av arbeiðsumstøðunum, vantandi játtan e.l.

Tað eru tó nakrar avmarkingar í talufrælsinum, men tær eru fáar. Starvsfólk hava ikki rætt til at úttala seg um viðurskifti, sum koma undir tagnarskyldu, ella at koma við ærumeiðandi viðmerkingum. Starvsfólk hava heldur ikki rætt til at koma við órímiliga grovum viðmerkingum, ella koma við (tilvitaðum) skeivum upplýsingum um týdningarmikil viðurskifti innan fyri egið arbeiðsøki.

Við atliti at avgerðatilgongd og virkisføri hjá almennum myndugleikum kunnu vera ávísar avmarkingar í frælsinum at útala seg um sítt egna arbeiðsøki. Henda avmarking er vanliga bert galdandi fyri leiðandi starvsfólk, so sum aðalstjórar, deildarstjórar og líknandi. Hetta er ikki galdandi fyri stovnsleiðarar, tá talan t.d. er um manglandi játtan o.l.

**Tagnarskylda avmarkar talifrælsið**

Ein lógarásett tagnarskylda avmarkar í stóran mun talifrælsið hjá alment settum starvsfólki. Tagnarskyldan merkir, at starvsfólk ikki mugu lata víðari ella brúka trúnaðarupplýsingar. Reglur um hetta eru í kap. 8 í fyrisitingarlógini, jbr. § 152 og §§ 152c – 152f í revsilógini.

Tað kann ofta vera torført at seta greið mørk fyri tagnarskylduni. Tá talan er um eymar, persónligar, fíggjarligar ella sosialar upplýsingar, er lættari at staðfesta, at hesar upplýsingar koma undir tagnarskyldu. Men ofta hava fólk ta skeivu fatan, at allar upplýsingar, sum tey fáa í starvi sínum, koma undir tagnarskylduna. Men soleiðis er veruleikin ikki. Sum ein vegleiðandi regla kann sigast, at allar upplýsingar, sum eru almennar sambært lógini um alment innlit, kunnu starvsfólk í útgangsstøðinum eisini siga sín hugsan um alment – tað valdast sjálvsagt mátan, hetta verður gjørt, nær og í hvørjum sambandi.

Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200900115 viðvíkjandi klagu um skrivliga ávaring til ein lærara á Vinnuháskúlanum førdi klagarin fram, at skúlastjórin á einum starvsfólkafundi framdi brot á tagnarskyldu sína, tá hann kunnaði um, at leiðslan hevði slept ætlanini um at siga klagaran úr starvi, og hevði broytt ætlanina til eina skrivliga ávaring. Upplýsingar um starvsviðurskifti, eitt nú um ætlanarskriv um uppsagnir ella ávaringar, sum skal latast einum alment settum persóni, eru ikki at meta sum trúnaðarupplýsingar. Hóast talan í hesum føri ikki eru um trúnaðarupplýsingar, er talan um persónsupplýsingar, sum koma undir persónsupplýsingarlógina (løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004). Sambært § 8, stk. 1, í persónsupplýsingarlógini, skulu persónsupplýsingar verða viðgjørdar samsvarandi góðum dátuviðgerðarsiði og kunnu ikki latast víðari til onnur uttan so, at talan er um samtykki frá tí persóni, sum upplýsingarnar viðvíkja, ella um víðarigevingin av persónsupplýsingum byggir á saklig atlit. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja nakað endamál við, at stjórin á Vinnuháskúlanum av sínum eintingum boðaði starvsfólkunum frá, at ætlanin var at geva klagaranum eina skrivliga ávaring. Hetta kann, umframt at vera tyngjandi fyri klagaran, geva ta óhepnu fatan, at avgerðin í veruleikanum var tikin, og at tað tí var nyttuleyst hjá klagaranum at gera viðmerkingar til ætlaðu ávaringina.

**Hóast loyalitetsskyldu kunnu starvsfólk vísa á brek**

Reglunar um loyalitet og samstarvsvilja hjá alment settum starvsfólkum byggja á eina siðvenju, sum er galdandi fyri øll starvsfólk. Ein arbeiðsgevari kann krevja, at starvsfólk, meðan tey eru í starvi, eru samstarvsfús og loyal móti leiðslu og arbeiðsplássi sínum. Loyalitetskravið er galdandi bæði í og uttan fyri arbeiðstíð.

Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200700008 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu frá einum starvsfólki, sum hevði fingið eina munnliga ávaring. Ávaringin varð grundað á eitt skriv, sum starvsfólkið hevði skrivað aftaná eina kvøldvakt og síðani lagt á borðið hjá leiðaranum, umframt trý teldubrøv, sum starvsfólkið hevði sent leiðaranum. Í skrivinum fanst starvsfólkið serliga at vánaligu arbeiðsumstøðunum. Umboðsmaðurin vísti á, at almenn starvsfólk hava bæði rætt og skyldu at vísa á viðurskifti, sum eru óforsvarlig. Teldubrøvini vórðu skrivað

sum framhald av umrødda skrivi, og eftir at leiðslan hevði konfronterað starvsfólkið við eina klagu frá einum avvarðandi. Umboðsmaðurin helt ikki, at innihaldið ella tónalagið í teldubrøvunum til leiðaran var soleiðis háttað, at tað av røttum skuldi kunnað gera tað trupult hjá leiðaranum at samstarva við starvsfólkið. Umboðsmaðurin helt tí ikki, at grundarlag var fyri ávaringini, sum var latin, og mælti kommununi til at taka málið upp aftur til viðgerðar og at ógilda hesa ávaring.

**Atfinningin skal vera sømilig**

Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200900115 viðvíkjandi klagu um skrivliga ávaring til ein lærara á Vinnuháskúlanum viðgjørdi umboðsmaðurin spurningin um vantandi samstarvsvilji eins og manglandi loyalitetur kundu verða sakligar orsøkir til at geva einum starvsfólki eina skrivliga ávaring. Umboðsmaðurin metti, at starvsfólk sum ein liður í loyalitetsskylduni móti arbeiðsplássinum mugu metast at hava bæði rætt og skyldu til at boða leiðsluni frá viðurskiftum, sum ikki eru nøktandi. Ein grundleggjandi partur av loyalitsskylduni hjá starvsfólki er, at um starvsfólk vilja gera vart við viðurskifti á arbeiðsplássinum, sum ikki eru nøktandi, skulu starvsfólk í fyrsta lagi venda sær til leiðsluna, soleiðis at leiðslan fær høvi at meta um málið og rætta møgulig misstøk og feilir. Umboðsmaðurin metti, at framferðarhátturin og skuldsetingarnar í skrivinum til Mentamálaráðið ikki vóru gjørdar á ein sømiligan hátt, eins og málburðurin í skrivinum vóru óhóskandi. Tað var uttan týdning í hesum sambandi, um ákærurnar vóru rættar ella skeivar. Umboðsmaðurin hevði tí onga viðmerking til, at Vinnuháskúlin av hesi orsøk valdi at geva klagaranum eina skrivliga ávaring fyri brot á loyalitetsskylduna.

**Atfinningarsom – men ikki illoyal**

Danski umboðsmaðurin viðgjørdi í FOB 98.319 eitt mál um trý starvsfólk hjá „Told og Skat“. Hesi høvdu í einum vikublaði verið atfinningarsom um avgerðina hjá stýrinum fyri „Told og Skat“ at leggja um partar í tolleftirlitinum. Leiðslan helt, at starvsfólkini vóru illoyal ímóti stovninum. Leiðslan gav starvsfólkunum boð um, at hon hvørki vildi hava slíka umrøðu ella hava framtíðarætlanir fyri stovnin almannakunngjørdar. Umboðsmaðurin helt, at alment sett

starvsfólk, sum siga sína hugsan í arbeiðsørindum, mugu vera lýðin móti teimum boðum, sum leiðslan ásetir. Men leiðslan í einum stovni kann ikki skerja rættin hjá starvsfólkum at siga sína hugsan sum privatpersónar. Umboðsmaðurin metti, at tey trý starvsfólkini høvdu úttalað seg sum privatpersónar innan teirra starvsøki. Tey høvdu ikki tikið lut í avgerðini at leggja um partar í tolleftirlitinum og kendu tí ikki avgerðina. Starvsfólk eiga at kunna siga sína meining um eitt arbeiðsøki og vera atfinningarsom uttan at vera mett sum illoyal. Tí metti umboðsmaðurin, at tey trý starvsfólkini áttu ikki at havt fingið átaluna frá leiðsluni.

**Hvassorðað tíðindaskriv í lagi**

Eitt dømi um, hvar markið gongur hjá starvsfólki alment at finnast at viðurskiftum á arbeiðsplássinum, er at finna í FOB 95.422 frá danska umboðsmanninum. Tveir sjúkrarøktarfrøðingar sendu eitt hvassorðað tíðindaskriv út um starvsviðurskiftini á einum amtssjúkrahúsi. Eina viku seinni sendi kommunan eitt tíðindaskriv um, at heilsunevndin harmaðist um, at sjúkrarøktarfrøðingarnir ikki høvdu brúkt ta vanligu álitismanna- og leiðsluskipanina á sjúkrahúsinum. Tá umboðsmaðurin viðgjørdi málið, segði amtið, at tíðindaskrivið skuldi skiljast sum eitt harmaskriv um framferðarháttin hjá sjúkrarøktarfrøðingunum, og at tað ikki var at skilja sum, at tær vóru átalaðar persónliga. Umboðsmaðurin skilti afturímóti orðingina í tíðindaskrivinum sum atfinning móti sjúkrarøktarfrøðingunum. Umboðsmaðurin helt atfinningina verða ógrundaða, tí at viðmerkingin hjá sjúkrarøktarfrøðingunum lá innan fyri vanliga talufrælsið hjá alment settum starvsfólki. Harafturat hevði umboðsmaðurin onga viðmerking til, at leiðslan á einum almennum arbeiðsplássi hevði ávísar innanhýsis skipanir til at føra fram sínar atfinningar. Men hugburðurin ella framferðin hjá leiðsluni má ikki verða soleiðis háttað, at hesar skipanir í veruleikanum kunnu skiljast sum sensurur. Tá leiðslan mælir til at brúka innanhýsis skipanir, má tað undirstrikast mótvegis starvsfólkunum, at rætturin til at siga sína meining alment ikki hervið verður skerdur.

**Leiðslan kann áseta samskiftispolitikkin**

Talifrælsi er bara vart ella er galdandi, tá eitt starvsfólk sigur sína hugsan egna vegna. Leiðslan á einum stovni kann áseta avmarkingar

fyri, hvør kann gera viðmerkingar ella tosa við fjølmiðlar fyri myndugleikan ella stovnin, og leiðslan kann gera vegleiðingar fyri, hvussu viðmerkingin skal berast fram.

Tá eitt starvsfólk úttalar seg egna vegna, kann leiðslan ikki krevja, at viðkomandi skal hava eina góðkenning frammanundan, ella at leiðslan skal kunnast um hetta.

Um vandi er fyri, at almenningurin kann fáa ta fatan, at starvsfólk úttalar seg vegna myndugleikan, hevur tann, sum úttalar seg um sítt egna arbeiðsøki, ábyrgd av at gera greitt, at viðkomandi úttalar seg egna vegna.

**Summir stovnar hava samskiftispolitikk**

Tað er torført at meta um, hvussu stórur tørvur er á serligum reglum ella vegleiðingum fyri tagnarskylduni mótvegis loyalitetsskylduni og talufrælsinum.

Ávísir almennir stovnar hava gjørt ein samskiftispolitikk fyri stovnin. Ein slíkur politikkur er at finna á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum, har m.a. stendur, at opinleiki, gjøgnumskygni, skjótleiki og trúvirði eru lyklaorð í samskiftinum hjá Fíggjarmálaráðnum við umheimin, og at endamálið við samskiftinum er at geva borgarum, fjølmiðlum og almenninginum annars eina rættvísandi mynd av virkseminum hjá Fíggjarmálaráðnum.

**Almenna fatanin**

Hóast almennir stovnar hava ein samskiftispolitikk, sum ásetir leiðreglur fyri, hvussu tað almenna samskiftið við umheimin skal vera, kann tann vanliga fatan vera, at starvsfólk ikki hava rætt til at úttala seg um ávís viðurskifti, ella at taka lut í tí almenna kjakinum. Men sum áður nevnt hevur fyrisitingarlógin og lógin um alment innlit júst til endamáls at geva betri gjøgnumskygni og opinleika í almennu fyrisitinga, og tí er tað bæði í lagi og neyðugt, at almenn starvsfólk gera vart við viðurskifti, sum tey hava eina servitan um.

*Birta Biskopstø, ráðgevi*



# VI. Eftirlit

*„Av tí at lógarverkið í Føroyum ikki er dagført, er rættarstøðan hjá dømdum menningartarnaðum í Føroyum sera vánalig. Eg fari staðiliga at heita á landsstýrismannin í innlendismálum, sum umsitur málsøkið revsi- og rættargangslóg, um at skipa so fyri, at lóggávan á hesum økinum verður dagførd, soleiðis at rættarstøðan hjá teimum dømdu á Bóndaheygi 14 verður tryggjað.“ (brot úr áliti frá umboðsmanninum frá j. nr. 200700007)*

**Arbeiðsøki umboðmannsins**

Umboðsmaðurin hevur, sambært lógini um Løgtingsins umboðsmann, eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum, eins og umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikar ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja

neyðugar kanningar í hesum sambandi. Myndugleikar hava skyldu til at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt. Harumframt hevur umboðsmaðurin rætt til at vitja øll støð, ið verða kannað, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Nógv tey flestu málini, sum umboðsmaðurin hevur til viðgerðar, snúgva seg um klagur frá borgarum. Viðgerðin av innkomnum klagum kemur í fyrstu røð. At umboðsmaðurin raðfestir viðgerð av innkomnum klagum fremst, skal síggjast í samanhangi við, at teir borgarar, sum hava vent sær til umboðsmannin við eini ítøkiligari klagu, ofta hava ta fatan, at tey eru illa viðfarin av einum myndugleika í sambandi við, at myndugleikin hevur tikið eina avgerð, ella at avgerðin ikki er røtt, ella at myndugleikin als ikki tekur eina avgerð.

Sjúrður Rasmussen, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, vísti í fyrilestri sínum á ráðstevnuni, ið varð hildin á 10 ára degnum hjá umboðmansstovninum, millum annað á, at: „Tað at klagað verður til løgtingsumboðsmannin er uppá ein ella annan hátt eitt útrykk fyri, at klagarin enn hevur eitt sindur av resursum. Tann púra hjálparleysi hevur ikki slíka orku og klagar tí ikki.“

**Mál av egnum ávum**

Hóast meginparturin av arbeiðsorkuni hjá umboðsmanninum hevur verið nýttur at viðgera innkomnar klagur, hevur umboðsmaðurin tikið mál upp av egnum ávum og hevur eisini verið á eftirlitsvitjanum á stovnum. Hesi eftirlitsmál eru ikki so nógv í tali, men hava fylt nakað meira í vavi og hava eisini verið rættiliga orkukrevjandi fyri stovnin.

Felags fyri tey flestu eftirlitsmálini, sum umboðsmaðurin hevur tikið upp av egnum ávum, er, at umboðsmaðurin hevur mett, at talan hevur verið um ein bólk av fólki í samfelagnum, sum hevur torført við at koma til orðanna. Í summum førum hevur eisini verið talan um, at ein klaga er komin til stovnin, sum á tann hátt hevur gjørt umboðsmaðurin varhugan við málini, og tá hevur umboðsmaðurin mett tað at vera neyðugt at seta ein størri kanning í verk.

**Kanningar av ymiskum málum**
Í 2005 fór umboðsmaðurin undir at kanna 70 ymisk mál hjá Almannastovuni (j. nr. 200500059). Tey mál, sum umboðsmaðurin gjøgnumgekk frá Almannastovuni vóru 20 mál um fyritíðarpensjónir, 20 mál um sjúkradagpening, 10 mál viðvíkjandi koyristólum, 10 mál viðvíkjandi gongustativum, 5 mál viðvíkjandi avlamisbilum og 5 mál viðvíkjandi íbúðarbroytingum. Biðið varð um tey seinast avgreiddu málini í hvørjum bólki.

Í 2007 kannaði umboðsmaðurin 10 fyritíðarpensjónsmál og 15 endurbúgvingarmál (j. nr. 200700061).

Orsøkin til, at umboðsmaðurin kannaði hesi mál hjá Almannastovuni, var fyrst og fremst tann stóri viðskiftaskarin, sum Almannastovan hevði, og harvið eisini tann stóra týdningin, sum stovnurin hevur fyri samfelagið.

Ætlanin við kanningunum var ikki at leita eftir einstøkum smærri feilum, men afturímóti eftir „systemfeilum" í málsviðgerðini og møguligum óhepnum mannagongdum.

Tilmælini frá umboðsmanninum førdi við sær, at eitt nú mannagongdir og oyðubløð hjá Almannastovuni vóru endurskoðað, eins og grundleggjandi fyrisitingarligar reglur, millum annað notatskyldan, hoyring og viðgerðartíðin av málum, vóru innskerpað yvir fyri starvsfólkum.

**Eftirlitsvitjanir**
Umboðsmaðurin var í oktober 2002 á eftirlitsvitjan á psykiatriska deplinum (j. nr. 200200039). Á hesi eftirlitsvitjanini gjørdi umboðsmaðurin vart við, at hann ikki helt tað vera nøktandi, at upp til fýra sálarsjúklingar vóru stúvaðir saman á somu stovu, eins og tað var sera óheppið, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum vóru har meira ella minni ímóti sínum vilja, ikki høvdu umstøður at vera fyri seg sjálvan.

Støðan á psykiatriska deplinum var ikki ókend hjá heilsu- og almanna-

myndugleikunum, og tí var talan ikki um nakrar nýggjar upplýsingar, men tað er ikki óhugsandi, at júst tað, at umboðsmaðurin gjørdi vart við hesi viðurskifti, gjørdi, at myndugleikarnir skjótari fóru undir eina tilgongd at betra um umstøðurnar hjá teimum sálarsjúku. Longu árið eftir vórðu hús keypt við tí endamáli at hýsa fólki, ið eru sálarsjúk, og sum ikki høvdu tørv á at vera innløgd á psykiatriska depilin. Eisini førdi hetta við sær, at verulig gongd kom á ætlanirnar um at betra um støðuna hjá teimum 40-50 fólkunum, sum ikki høvdu tørv á at vera innløgd á psykiatriska deplin.

Umboðsmaðurin var í februar 2007 á eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi (j. nr. 200700007). Umboðsmaðurin viðgjørdi í frágreiðingini leiklutin hjá føroysku myndugleikum, sum varða av hesum øki. Umboðsmaðurin hevur ikki heimild at viðgera leiklutin hjá dómsvaldinum og Føroya landfúta, sum eru danskir myndugleikar í Føroyum. Serforsorgin varð 1. januar 1988 yvirtikin sum føroyskt málsøki.

Sambært frágreiðingini hjá umboðsmanninum var orsøkin til eftirlitsvitjanina á sambýlinum á Bóndaheygi í Havn, at hetta sambýlið, umframt at hýsa einum veikum bólki í samfelagnum, eisini hevði ein serligan áhuga, av tí at persónar, ið hava revsidóm, búgva í sambýlinum.

Í frágreiðingini hjá umboðsmanninum sæst, at undir eftirlitsvitjanini búðu tveir persónar á sambýlinum, sum høvdu ávikavist dóm til uppihald á stovni, og dóm til umsjón Almannastovunnar. Tá umboðsmaðurin var á vitjan, vóru umleið 17 ár síðani, dómur varð feldur í tí eina málinum, og bert einaferð í hesum tíðarskeiði, umleið 3 ár eftir, at dómur varð feldur, varð dómurin tikin uppaftur. Umboðsmaðurin fekk upplýst, at hin dómurin ongantíð varð tikin upp til endurskoðan, og tá ið umboðsmaðurin var á vitjan, vóru umleið 12 ár síðani, at dómur varð feldur. Av tí at umboðsmaðurin ikki hevði heimild til at viðgera leiklutin hjá dómsvaldinum og Føroya landfúta, sendi umboðmaðurin hesar upplýsingar til Folketingets Ombudsmand, sum tók sær víðari av málunum. Folketingets Ombudsmand tók málið upp til fyribils viðgerð. Hetta hevði við sær, at gongd kom á málini

hjá teimum dømdu, eins og Føroya Rættur eftirfylgjandi hevur tikið dómarnar hjá teimum dømdu upp til endurskoðan.

Á eftirlitsvitjan á Bóndaheygi gjørdi umboðsmaðurin eisini vart við, at tað er óheppið, at búfólk við dómi og búfólk uttan dóm búgva á sama stovni. Hetta hevur t.d. við sær, at tey búfólk, ið ikki hava dóm, eru undir somu ávaringarskipan, sum tey búfólkini, ið hava dóm, og kunnu tí ikki ferðast frítt inn og út úr íbúð síni. Eisini hevur hetta við sær, at tey búfólk, ið ikki hava dóm, kenna seg settan í bás saman við teimum búfólkum, ið hava dóm. Av tí at tað sýntis sum, at búfólkini trívast saman, fór umboðsmaðurin ikki at gera meira við hetta, men umboðsmaðurin bað Nærverkið umhugsa samansetingina av búfólki hesum viðvíkjandi, tá ið tey taka nýggj búfólk inn á stovnin.

Eftirlitsvitjanin á Bóndaheygi hevði millum annað við sær, at landsstýrismaðurin í innlendismálum, sum umsitur málsøkið revsi- og rættargangslóg, skipaði so fyri, at lóggávan á hesum økinum varð dagførd, soleiðis at rættarstøðan hjá teimum dømdu á Bóndaheygi 14 varð betur tryggjað. Eisini var ein beinleiðis avleiðing av eftirlitsvitjanini hjá umboðsmanninum, at danskir myndugleikar í Føroyum fóru at viðgera mál, sum nærum vóru „gloymd". Ein av orsøkunum til, at hesi mál vóru „gloymd", er helst tann, at talan var um mál, sum bæði danskir myndugleikar og føroyskir myndugleikar varða av, og sum tað sæst í frágreiðingini, metti ongin av føroysku myndugleikunum seg hava ábyrgd av møguligum fráboðanum og uppfylging av málum hjá teimum dømdu.

Í 2012 var umboðsmaðurin á eftirlitsvitjan í sambýlunum á Traðarvegi og undir Fobbakletti í Sandavági (j. nr. 201200013) og í sambýlunum á Mýrunum 4 og 6 í Hoyvík (j. nr. 201200026). Í frágreiðingunum hjá umboðsmanninum verður millum annað staðfest, at Nærverkið (nú Almannaverkið) og Almannamálaráðið ikki hava útint lógarásettu eftirlitsskyldur sínar.

Henda lógarásetta eftirlitsskylda fevnir millum annað um, at hoyringsreglur verða hildnar, tá búfólk søkja um at flyta inn á sambýli, og eftirlit við sambýlunum sum heild, tað vil siga eftirlit við náms-

frøðiliga støðinum í sambýlunum, eitt heilsufakligt eftirlit, eftirlit við fíggjarviðurskiftunum, eitt nú hvussu húsaleigan skal ásetast, eftirlit við fysisku umstøðunum í sambýlunum, við valdsnýtslu og umsitingini í sambýlunum annars.

**Samanumtikið**

Tá umboðsmaðurin tekur mál upp av egnum ávum og ger kanningar av bústovnum, verða kanningarnar altíð gjørdar í samráð við teir myndugleikar, sum varða av økinum. Umboðsmaðurin hevur enn ikki verið á ófráboðaðum eftirliti, tí mett verður, at tað er neyðugt við einum góðum samskifti við myndugleikarnar, sum varða av økinum. Tað er fatanin hjá umboðsmanninum, at myndugleikarnir hava tikið væl ímóti vitjanum hjá umboðsmanninum, eins og umboðsmaðurin altíð hevur fingið neyðug skjøl og upplýsingar frá myndugleikunum í sambandi við kanningararbeiðið.

Við eftirliti, sum er í samstarvi við myndugleikan, kann umboðsmaðurin royna at tryggja, at myndugleikar ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

# VII. Skjøl

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4.stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur
## Kærumál og egin mál

**§ 6.** Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.* Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

## 4. Partur
## Kanningar

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur
## Niðurstøður

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal

umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur
## Lønar- og eftirlønarviðurskifti

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur
## Fyrisiting

**§ 16**. Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger rokn-

skap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur
## Ígildisreglur

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# *Skjal 2*

**Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann**

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan, hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, **hvønn** og **hvat** tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum o.s.fr.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*

Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*

Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

*„Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum…“ (§ 6, stk. 3)*

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

„…Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.“ (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti“ fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.fr. Klaga tygum

um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin, til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*

Í umboðsmanslógini stendur:

*„Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.“ (§ 6, stk. 4)*

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00, skriva teldupost til lum@lum.fo ella venda tygum til skrivstovuna undir Bryggjubakka 11, Tórshavn, um tygum hava spurningar.